# Hagtølini eru ræðandi

*Seinastu 50 árini hava 219 føroyingar latið lív í ferðsluni. Upp ígjøgnum sjeyti- og áttatiárini var talan um ein javnan vøkstur, men eftir at revsireglurnar gjørdust strangari seinast í áttitiárunum, minkaði talið aftur. Nú er so ætlanin at gera revsireglurnar linari*



*Síðani revsireglurnar fyri rúsdrekkakoyring og harðliga koyring vórðu gjørdar strangari, er ferðsludeyðatalið minkað munandi, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri ferðslutrygd*

***Mynd: Jens Kr. Vang***

Í blaðnum í gjár fanst leiðarin á Ráðnum fyri ferðslutrygd, Jón Kragesteen, at nøkrum av ætlaðu broytingunum í ferðslulógini.

Serliga tók Jón fram, at eftir hansara tykki átti revsingin fyri ferðmikla koyring og rúsdrekkakoyring ikki at linkast.

**Deyðstalið minkaði av lógarbroytingum**

Ein av høvuðsgrundgevingunum fyri hesum eru ferðsluhagtølini, sum her á síðuni verða víst fyri seinastu 50 árini.

Av talvuni framgongur, at ferðsludeyðin í Føroyum var í hæddini seinast í 80'unum. At tey eftir hetta minkaðu í stórum eru tríggjar høvuðsorsøkir til.

Fyrsta er, at í 1986, tá ferðsludeyðatalið setti met, var lóg um tvungna nýtslu av bilbelti sett í gildi, og sæst beinan vegin, at ein minking kom eftir hetta.

Tvey ár seinni, í 1998, vóru tvinnar lógir settar í gildi á økinum. Nevnliga frádøming av koyrikortið við meira enn 0,8 promillu alkohol í blóðinum, og reglan um frádøming av koyrikoyrti, tá koyrt var meira enn 30 km/t oman fyri hægs loyvda ferðamark.

Í triðja lagi hevði búskaparkreppan eisini síni árin, við tað at talið av ungfólki í bili minkaði í stórum um hetta mundi, eins og náttarkoyringin minkaði munandi.

Seinastu árini hava vit tó aftur merkt eina búskaparliga framgongd, og hevur henda aftur viðført eina øking av bilatalinum og náttarkoyringini, men enn er talið av ferðsluvanlukkum so langt í frá komið á sama støði, sum undan teimum báðum lógarbroytingum, sum nevndar eru omanfyri.

**Kann økjast aftur**

Tískil er eisini væl skiljandi, at Jón nú er ímóti ætlanunum um at gera revsireglurnar á økinum linari.

Verða avleiðingarnar av hesum, at ferðsludeyðatalið aftur fer at nærkast stabbunum frá áttatiárunum, er talan um eina alt annað enn hugaliga gongd, og í øllum førum er hetta beint ímóti málsetninginum í sonevndu null-hugsjónini.

Í hesi verður serliga tosað um at minkað um harðligu koyringina. Ein partur av hesum arbeiði er m.a. at tað undir ongum umstøðum eigur at verða koyrt skjótari enn 30 km/t í økjum, har bilar og fólk hittast.

Partvíst verður hetta gjørt við lóggávu, og partvíst við einum broyttum vegakervið, sum ætlandi skal viðføra, at ferðin á ferðsluni minkar av sær sjálvum.

At vegakervið skal broytast krevur sjálvandi stórar íløgur, og tískil er ikki væntandi, at hetta verður gjørt eftir einum degi, sigur Jón Kragesteen. Hann leggur tó afturat, at hetta ikki gevur nakra grund til at loyva harðligari koyring, ella linka um revsingina fyri hesa.

Tað er nú soleiðis, at fólk eru bangin fyri at missa koyrikortið, meðan tey hinvegin ikki eru so bangin fyri at fáa eina bót, sum er áljóðandi nakrar hundrað krónur.

Tá talan er um treytaðan dóm, uppstendur vandin fyri frádøming ikki fyrr enn tú longu hevur framt eitt lógarbrot, og tá kann skaðin longu vera hendur.

**Fleiri broytingar**

Talan er annars, sum nevnt í gjár um fleiri ætlaðar broytingar í ferðslulógini. Umframt omanfyrinevndu broytingum í revsireglum, er talan um at økja hámarksferðina fyri lastbilar og bussar, tvungin nýtsla av koyriljósi eins og reglur skulu setast í gildi um, at børn undir 15 ára aldur skulu sita í trygdarfetli.

Jón leggur áherslu á, at hann er púra samdur í flestu av lógarbroytingunum, og at tað bert er linkanin í revsireglunum, sum býðjur honum ímóti.




*Tølini tala. Ferðsludeyðatalið fall munandi, tá revsireglurnar gjørdust harðari í 1988*


## Virkisbygningur til leigu




Bygningurin hevur tvær hæddir sum kunnu leigast saman ella hvør sær. Hvør hæddin er uml. 150 fermetrar. Bert vinnulig útleigan.

Tekningar og myndir finnast á: http://www.algonet.se/~recovery

Carl August Arge, tel./fax: +46 650 21 700;
e-post: recovery@algonet.se


# Lokalpolitikarar fáa meiri í løn

*Samsýningarnar eru ásettar í løgtingslóg, og tí skulu kommunustýrini ikki taka støðu til spurningin, hevur løgmaður boðað kommununum frá*

Jóannes Hansen

Kommunupolitikararnir fara nú at fáa eina hægri samsýning fyri borgarligu umboðanina, enn teir higartil hava fingið.

Higartil hava kommunalpolitikarar fingið trý hundrað krónur fyri fundir, sum hava verið upp til tríggjar tímar, og tá fundirnir hava verið longri enn tríggjar tímar og longri enn fimm tímar, hava ávikavíst ein og tvær viðbøtur verið latnar afturat. Nú verður fyrsta viðbótin 392 krónur, fyri fundir ímillum tríggjar og fimm tímar verður samsýningin 784 krónur og longri fundir enn fimm tímar fara nú at geva 1.176 krónur.

**Lógarásett**

Løgmaður er landsstýrismaður í kommunumálum, og tað er Anfinn Kallsberg, sum í skrivi til kommunurnar hevur boðað frá broyttu samsýningunum. Broytingin verður galdandi frá 1. mars í ár.

Higartil hevur tað verið soleiðis, at kommunustýrini hava samtykt upphæddirnar fyri samsýningar, og síðani hava tey biðið landsstýrið um at góðkenna tær í kommunustýrunum samtyktu upphæddirnar. Men soleiðis er tað ikki longur. Nú eru fundarsamsýningarnar ásettar í lóg, og nú sigur løgmaður altso, at hesar skulu galda í øllum kommunum frá 1. mars í ár 2000.

**Ymisk tulking**

Í fjør fingu kommunurnar bræv um, at tær kundu hækka upphæddirnar, men tá varð ikki álagt kommununum at hækka upphæddirnar. Í summum kommunustýrum vórðu samsýningarnar hækkaðar, meðan onnur bygdar– og býráð ikki hækkaðu samsýningarnar.

Hóast upphæddirnar hava verið tær somu síðani eina ferð í áttati árunum, so hevur tað kortini verið ymiskt,

## Langur leygardagur í Runavík

Í dag skipar Hendilsmiðdepilin í Runavíkar kommunu fyri langum leygardegi.

Hesin langi leygardagurin er serliga í samband við tí stóru vetrarútsøluna í ár. Handlarnir í Handilsmiðdeplinum hava opið til klokkan 17.00.

Handilsmiðdepilin er 33 handlar, sum í felað vilja stykja marknaðarføringina av handilslívinum í Runavíkar kommunu.

Í samband við langa leygardagin hevur Sjómansheimið "luxus fish & Chips" á matskránni.



# Tollfrí søla fíggja útbygging av terminalinum

*Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri, sigur við Útvarpið, at antin verður ein fyribils loysn vald at selja tollfrítt ella verður bíðað eftir at terminalurin er liðugt útbygdur*

Sambært Finnboga Niclasen hevði Útvarpið hósdagin á middegi tey tíðindi, at Vága Floghavn nú skjótt kann fara undir at selja tollfríar vørur á flogvøllinum.

Útvarpið visti at siga, at Vága Floghavn søkti fyrr í vetur um loyvi at selja tollfríar vørur og Vinnumálastýrið hevur nú givið loyvi. Tað, sum enn vantar, er ein staðfesting av játtanini frá Toll og Skattstovuni. Men tað er ivasamt, um farið verður beinanvegin undir at selja tollfríar vørur á flogvøllinum, sambært Útvarpinum.

Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri, sigur við Útvarpið, at lítið pláss er í terminalinum í Vágum til slíkt virksemi. Tí verður antin ein fyribils loysn vald ella verður bíðað eftir at terminalurin er liðugt útbygdur.

– Men til tess at fáa grønt ljós fyri at útbyggja terminalin var neyðugt fyrst at fáa loyvi at selja tollfrítt. Tollfría sølan skal nevniliga vera við til at fíggja útbyggingina av terminalinum.



**Á fundi**

Finnbogi Niclasen hevur júst verið á fundi við Statens Luftfartsvæsen, sum rekur flogvøllin í Vágum. Á fundinum var avtalað, at arbeiða víðari við ætlanini at útbyggja terminalin. Hann skal víðkast góðar 2000 fermetrar, sambært Útvarpinum.

– Tað verður ikki bara tollfría sølan, sum skal fíggja útbyggingina av terminalinum. Trý parkeringspláss eru til flogfør í Vágum, men nú skal eitt stórt parkeringspláss gerast afturat umframt eitt parkeringspláss til tyrlur. Hetta skuldi givið nakað av eykainntøkum.

Finnbogi Niclasen sigur við Útvarpið, at í verandi støðu er einki høli tøkt til tollfría sølu. Men onkrir møguleikar vera tó umhugsaðir, so byrjast kann um ikki alt ov langa tíð, sigur hann.

Ætlanin er at hava tollfría sølu til bæði farandi og komandi ferðafólk, sambært flogvallarstjóranum.



# Jazzcafé í Gøtu

Leygardagin 29. januar kl 20.00 skipar Grót fyri enn eini tónleikacafé.

Hesaferð verður høvið at hoyra nakrar av kanska fremstu jazztónleikarunum vit eiga í landinum. Tað eru Snjóuglan og Eivør Pálsdóttir Kvartet, ið vera á skránni.

Í Snjóugluni spæla so navnframir menn sum Kristian Blak, ið vegna stóru royndir sínar av sonnum kann kallast ein rættur Jazzabbi. Sonur hansara Mikael spælir bass og úrmælingurin úr Klakksvík Høgni Klakkstein spælir trummur. Heðin Ziska Davidsen, kendur úr so ymiskum bólkum sum „Hatespeach“ og „Í eb´inum“ (úttalast: essinum) spælir guitar. Eivør Pálsdóttir Kvartett hevur spælt rættiliga nógv, síðan hon byrjaði.

Tey eru Búi Dam, guitar; Brandur Jacobsen, trummur; Mikael Blak, bass og Eivør Pálsdóttir, sang.


